

**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NL 142 **Km:** 170.000
**Árgangur:** 21.02.2003

**kr. 90.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 B STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 781 **Km:** 36.000
**Árgangur:** 29.05.2006

**kr. 188.000,-**



**MAZDA 626 2.0**

**Skrásetingarnr:** SD 811 **Km:** 85.000
**Árgangur:** 19.12.2001

**kr. 85.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 D-4D TERRA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003

**kr. 174.000,-**



**CITROEN C5 2.2 HDI STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SJ 415 **Km:** 98.000
**Árgangur:** 05.03.2004

**kr. 160.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005

**kr. 235.000,-**



**RENAULT MEGANE 1.6**

**Skrásetingarnr:** DH 358 **Km:** 60.000
**Árgangur:** 01.07.2002

**kr. 75.000,-**



**MITSUBISHI PAJERO SPORT VAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MG 794 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 17.02.2006

**kr. 188.000,-**



**LANDCRUISER 4.2 TD, BUSSUR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HP 037 **Km:** 146.458
**Árgangur:** 24.06.2001

**kr. 265.000,-**



**CITROEN XSARA 1.6**

**Skrásetingarnr:** NB 446 **Km:** 78.000
**Árgangur:** 30.05.2002

**kr. 78.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstávir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F




*– Tað kom heilt óvæntað, fyrst manglaði eg seks tøl, so fimm, knappliga bara 79 og 19 og so rópti eg ring, Gekkur!*

*Mynd: Jóannes Poulsen*

# So fór milliónin

**22 ára gamla Heidi Restorff úr Havn gjørdist vinnarin av størsta vinninginum, ið nakrantíð er handaður í Føroyum. Talan er um gekkin, ið um seinastu 28 vikurnar hevur staðið í vøkstri**

EYDNUSPÆL
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Fríggjakvøld eftir fríggjakvøld hava tiltøk verið avlýst, orsakað av tí at fólk hava sitið trøllbundin frammanfyri sjónvarpsskíggjunum. Talið av seldum gekkum hevur ligið yvir 40.000 seinastu vikurnar og kortini hevur ikki eydnast nøkrum at vinna, fyrr enn nú.

Róp og skríggj hoyrdust úr Klaksvík, har Heidi Restorff var, tá hon snaraði hjólinum á rætta stað. Í triðju atløgu eydnaðist tað henni at vinna tær 1.250.000 krónurnar.

Hon var stødd saman við sjeikinum, familju hansara og vinum har, men er sjálv úr Havn. Hon er 22 ár og dóttir Brynhild og Heina Restorff.

- Einki broytt

Sera torført var at fáa fatur á Heidi Restorff, hetta kvøldið hon vann. Fólk ringdu úr øllum ættum og ynsktu henni tillukku – og hon var als ikki á jørðini. Kortini eydnaðist tað Sosialinum at fáa eitt stutt prát við hana.

Tað var als ikki gingið upp fyri henni, hvat var hent. – Øll kalla meg millioner, eg veit slett ikki hvat tað merkir longur. Einki er broytt, segði hon. Ætlanin er fyrst og fremst at seta meginpartin á bók, í minsta lagi eina millión ella meir. Umframt at bjóða vinfólkunum í býin hetta kvøldið, fer eitt sindur av peninginum helst til at ferðast fyri. – Eg havi altíð droymt um at sleppa at ferðast runt í Amerika ella Evropa, segði hon glað.

Hon fekk studentsprógv úr Hoydølum í 2005 og arbeiðir í dag á posthúsinum á Óðinshædd. Einaferð í framtíðini ætlar hon sær út í heim í lestrarørindum, men hvat hon fer at lesa, hevði hon ikki funnið útav enn.


**RUKO LÁSATÆNASTA** Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20

i
Sosialurin